# Ríkisrættarliga støðan

**Sámal Petur í Grund**
*landsstýrsismaður Sjálvstýrisfloksins*



Allir flokkar, sum hava stillað upp til løgtingsvalið 30. apríl, uttan Sjálvstýrisflokkurin, siga seg vilja loysa ríkisrættarligu støðuna í komandi valskeiði.

Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Miðflokkurin og Fólkaflokkurin siga seg allir at vilja loysa ríkisrættarligu støðuna.

Sambandsflokkurin sigur, at hann vil loysa ríkisrættarligu støðuna einaferð med alla.

Um valið bara nøkurlunda fellur út soleiðis sum veljarakanningarnar vilja vera við, við einari polarisering millum samband og loysing, so er tað burtur úr vón og viti at taka eitt tílíkt stig.

At loysa ríkisrættarligu støðuna, hvar ein uppá forhond veit at tað er "hips um haps", hvussu úrslitið kemur at síggja út, kann ikki annað enn gerast ein vanlagna fyri føroyska fólkið og tjóðina.

Tí er tað sera umráðandi at fólkið staðiliga stendur saman um Sjálvstýrisflokkin, sum klárt sigur, at vit ikki eiga at loysa ríkisrættarligu støðuna undir teimum fortreytum sum nú eru galdandi.

Sjálvt løgtingssamtyktin um sjálvstýri føroya fólks, leggur upp til ein longri tíðarkarm.

Vel tí Sjálvstýrisflokkin, lista D. tann 30. apríl.

# Virðiligari lív hjá pensionistunum

**Rasmus Niclasen**
*valevni Javnaðarfloksins í Vágunum*



At taka sær av okkara gomlu hevur altíð verið eitt av aðalmálum javnaðarfloksins. Tað stríðið hevur ikki altíð verið so lætt. So hóast nærum allir flokkar stilla seg á rað í hesum døgum at lova lættar og pensiónshækkingar, so sigur søgan okkum nakað annað. Oftani hevur verið neyðugt at hála teir aftaná okkum, ja, líka síðani Petur M. Dam innførdi fólkapensiónina í 1958.

Orsøkin er tann, at grundin eigur at byggja á virðing fyri okkara eldru, ikki bara teimum vælbjargaðu, men teimum øllum somlum. Tí er tað, at vit skjóta upp, at pensiónin verður bygd á samhaldsfesti. Henda hugsanin, at vit gjalda inn í grunnin eftir førimuni, men at øllum verður veitt sama útgjald. Hví skal tann stættarmunur, sum hevur fylgt okkum gjøgnum alt okkara arbeiðsføra lív, eisini fylgja okkum í ellisárunum? Tað átti at verið betri at givið øllum møguleikan fyri tryggum ellisárum.

Aðrir flokkar blíva við at tvíhalda um privatar tryggingar, har hvør einstakur fjálgar sær. Men hetta loysir jú ikki trupulleikan, og er bara eitt framhald av teimum skeivleikum, ið vit annars uppliva gjøgnum lívið. Somu flokkar tosa í álvara um at hava pensiónsuppsparingar, har ið gjaldið er uml. 10% av inntøkuni. Hvussu stórur partur av arbeiðarafjøldini hevur ráð til eitt slíkt gjald?

Ein annar aðalmunur á privatari trygging og samhaldsfasta er, at meðan ein privat trygging ikki kemur í gildi, fyrr enn tú verður pensioneraður, tað vil siga í miðal aftaná 30 ár, so virkar samhaldsfasti frá fyrsta degi. Tey í arbeiðsførum aldri gjalda inn í grunnin, og pensionistarnir fáa útgjaldið.

Tí skjóta vit upp at gjaldið til samhaldsfasta hækkar úr _ - 2%. Samstundis skal skattalækking veitast, ið svarar til hækkingina. Hetta hevur við sær, at samhaldsfasta útgjaldið, sum í dag er 700 kr um mánaðin, hækkar upp í 2.800 kr. Fólkapensiónin er í dag umleið 7.000 kr. í mesta lagi. Tað vil siga, at útgjaldið kemur at nærkast 10.000 kr um mánaðin.

Hetta er veruliga nakað sum munar, og er vert at byggja á.

# Sambandsflokkurin - ein dynamiskur vinnulívsflokkur

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Við byrjanina av hesum valskeiðinum lat Høgni Hoydal okkum vita, at um vit bert fingu loysing ella fullveldi, so fylgdi tað sum av eini náttúrulóg, at tað kom ein dynamikkur í búskapin. Fólk fóru at gera meira tá íð neyðin stóð í durðinum Eingin búskaparfrøðingur hevur enn lagt navn til henda tankan.

Harafturímóti hava hesi seinastu fýra árini víst, at dynamikkur kann koma í búskapin uttan loysing og fullveldi. Vit hava hesi árini upplivað eina búskapargongd, sum neyvan fyrr er upplivað í Føroya søgu og tað er uttan, at nakar í samgonguni hevur lyft hond frá síðu til at seta nakað í gongd. Hartil hevur fullveldismálið rúgvað ov nógv upp í teirra heimi.

Dynamikkurin í búskapinum hesi árini er komin av

- Óvanliga stórum tilfeingi í sjónum
- Óvanliga høgum prísi á fiski og fiskaúrdráttum
- Dugnaligum fólki á sjógvi og landi
- Undangongufólki við áræði til at gera íløgur
- Einum væl útbygdum samfelag til at útnytta møguleikarnar

Og tað ræður um at verja hesa góðu gongdina og fáa hana at halda áfram. Tí tað er úr vinnuni, at øll framgongd og vælferð skal gjaldast. Ein framgongd her er vegurin til ein sjálvberandi búskap, sum skal geva okkum møguleika fyri at varðveita verandi vælferð.

Tí fer Sambandsflokkurin at stuðla framhaldandi menning av okkara vinnum við at lætta um nøkur av teimum tyngstu gjøldunum sum t.d. flutningi, orku o.m.a.

Ein krossur fyri Sambandsflokkin er ja til eina skilagóða menning av vinnumálum fyri eitt framhaldandi gott og ríkt land at búgva í.

**Flyvesikringstjenesten**

**AFIS-operatør til Færøerne**

Flyvesikringstjenesten søger en AFIS-operatør til Vagar Lufthavn til ansættelse 1. juni 2002.

Dine arbejdsopgaver bliver:

- Flyvepladsinformationstjeneste (AFIS)
- Flyveinformation- og alarmeringstjeneste
- Luftfartsinformationstjeneste
- Vejrobservationstjeneste

Ansøger der har gyldigt AFIS-certifikat og godkendt til vejrobservationstjeneste vil blive foretrukket.

Løn- og ansættelsesvilkår:
Ansættelse vil ske på tjenestemandslignende vilkår i lønramme 19, med en årsløn på kr. 229.324,00

Endvidere ydes et stedtillæg på kr. 20.454,55 pr. år

Efter gennemført praktisk uddannelse ydes et rådighedstillæg på kr. 52.755,5 pr. år.
Alle beløb er i oktober 2001 niveau.

Yderligere oplysninger:
Har du behov for yderligere oplysninger, kan du kontakte luftfartsinspektør Mads Johannesen/ Vagar på telefon + 298 354452 – mobil +298 213387.

Ansøgning vedlagt relevant dokumentation, bedes sendt til:

Flyvesikringstjenesten
Human Resources
Naviair Alle 1
DK 2770 Kastrup

Ansøgningen mærkes "AFIS-operatør" og fremsendes så den er os i hænde senest onsdag den 8. maj 2002 kl. 12.00

FLYVESIKRINGSTJENESTENs opgave er at levere lufttrafiktjeneste, dvs. at lede fly sikkert og med mindst mulig forsinkelse gennem dansk luftrum. Virksomheden uddanner selv alt operativt personale – med flyvelederuddannelsen som den primære – og driver og vedligeholder de avancerede tekniske systemer og flyvesikringsanlæg.

Virksomheden har ca. 700 medarbejdere, hvoraf hovedparten er flyveledere og teknisk personale, og en årlig omsætning på ca. 700 mio. kr.

FLYVESIKRINGSTJENESTEN er en statsvirksomhed under Trafikministeriet.

NAVIAIR

# Bygging av ítróttahøllum og skúlum

**Hans Jákup Simonsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Norðurstreymoy*



Nógvir skúlar eru gamlir og niðurslitnir, og undirvísingin hevur ikki góðar umstøður. Nýggj kanning vísir, at ein stórur partur av læraranum ynskja seg í annað starv. Hava børnini og lærarnir ikki nøktandi umstøðir, gongur tað út yvir undirvísingina, førleikan og menningina av børnunum. Tað er tí uppá tíðina, at fólkaskúlin fær betri kor at arbeiða undir.

Tær flestu størru kommunurnar hava í dag nokk av peningi til skúlabygging, men íløgukarmurin, ið Fíggjarmálastýrið áleggur kommununum, er ein forðing.

Seinasta bygdaráðið í Kollafirði kravdi í samband við ítróttarhøllina, ið Tórshavnar kommuna lovaði kollfirðingunum, at ein neyðug skúlaútbygging var tikin við, men ásannast má, at í Kollafirði er rættuligur steðgur komin í. Hálvtannað ár er gingið síðani kommunusamanleggingina, og onki ítøkiligt er gjørt. Byggimálið er enn í nevnd, og til endamálið eru í ár bert avsettar tríggjar milliónur krónur, so langt er á mál.

Útfrá hesum erfaringum haldi eg, at tað hevði verið skilagott, at ein kommuna, ið er fíggjarliga væl fyri, og sum yvir fyri Landsstýrinum kann grundgeva tørvin at byggja skúla- ella ítróttahøll, kann seta peningarligar upphæddir av til endamálið, ið liggja uttanfyri tann kommunala íløgukarmin.

Javnaðarflokkurin gongur inn fyri, at íløgukarmurin verður broyttur, soleiðis at tað aftur kunnu gerast neyðugar íløgur í skúlar og ítróttarhøllir, og at fólkaskúlin og ítrótturin fær nútíðarhóskandi umstøður at arbeiða undir í øllum landinum.





# Tjóðveldismaður siglir við donskum skipi

**Jákup J. Joensen**

Hetta fái eg ofta at hoyra, tá eg eri heima, men tað sigur mær einki, og eg tími ikki at svara teimum aftur, tí hesi fólk ganga politiskt við sólbrillum í toku.

Tá eg kom heim seinast, komu okur siglandi inn eftir Munkagrunninum á veg at landa á Fuglafirði. Sólin skein so fagurliga yvir tær kavaklæddu oyggjarnar, tá rann nógv fram fyri ein, sum ein hevur upplivað, hvussu politikkararnir hava úttalað seg um oyggjar okkara, og fingið ein stóran part av fólkinum at trúgva teimum. Eg minnist ein politiskan fund í Dansistovuni í Sumba í 1958, tá eg gjørdist tjóðveldismaður, tað Erlendur Patursson segði um oyggjarnar, hvussu ríkar tær vóru, um ríkidømið í undirgrundini og ikki at gloyma okkara ríku fiskigrunnar. Tá minnist eg, at javnaðarmenn og sambandsmenn ristu við høvdunum; hví teir gjørdu tað, visti eg ikki tá, men nú veit eg tað. Teir vildu ikki arbeiða fyri einum sjálvberandi føroyskum búskapi; teir vildu heldur fara við sambandsleypinum niður til Danmarkar at bidda sær nakrar krónur.

Aftur til áðurnevnda fund í 1958. Tá Erlendur, sáli, endaði sína røðu, komu javnaðarmenninir og sambandsmenninir upp; báðir søgdu teir, at sluppu tey føroysku skipini ikki til Ísland, Grønland, New Foundland ella eystureftir, og at um eingir pengar komu úr Danmark, so doyðu føroyingar í hungri. Hetta søgdu javnaðar- og sambandsmenn tá fyri støkum 50 árum síðan og hesa støðu hava teir, Gud hjálpi mær, enn. Støða Sambandsflokksins er ikki broytt stórvegis síðan 1906. Javnaðarfloksins støðu kennir eingin. Flokkurin og leiðari tess, hava ein støðu tá og aðra nú, alt eftir hvussu rákið í samfelagnum gongur. Teirra politikkur er ein vavgreytur, einki annað! Eg haldi, at støðan í hesum flokkum er versnað. Tá okur tjóðveldismenn tosa um loysing og fullveldi, siga teir at tað klára vit ikki, oyggjarnar eru ov smáar og eru ikki skaptar til fólk at búgva á, heldur til flytifugl at hvíla á áðrenn ferðina víðari norður.

Hetta er ein so stór misálitisváttan á "Skapara" okkara, at veljarin átti at givið hesum báðum flokkum durafjórðingin 30. apríl. Nei, góðu føroyingar, kvinnur og menn, latið ikki hesar politikkarar villleiða tykkum við at sáa svartaspillu yvir oyggjar og fólk okkara. Tað, sum Erlendur segði fyri 44 árum síðan, tað er nú váttað. Soleiðis bjóða tjóðveldismenn og kvinnur seg fram, byggja politikkin á veruleikan. Vit trúgva á hetta land og fólk okkara, og lata ikki onnur gjalda fyri okkum.

Eina ferð enn, latið ikki Javnaðarflokkin koma út í Tinganes eftir valið, tí teir hava longu boðað frá, at landsbakin skal tømast, um teir sleppa fram at fatinum. Teir eru fullkomiliga ábyrgdarleysir. Teir liva best í krepputíðum. Mín vón skal verða, at somu flokkar manna eitt landsstýri aftan á valið komandi.

Fyri at venda aftur til tað fyrsta. Jú, tjóðveldismenn sigla og hava siglt við næstan øllum heimsins tjóðum, og vilja vit samstarva við øll, eisini danir.

Vit tjóðveldismenn eru góðir við okkara land og trúgva á okkara mátt og megi.

Gott tjóðveldisval!

# Aftursvar til Eyðólv Dimon

**Til grein hansara um Sambandsfloksins leiklut í skerjingini av blokkinum.**

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Góði Eyðólv,

Tað er sera umráðandi, tá ein skrivar grein, sum tann tú gjørdi í seinasta Sosialinum, at hon kann prógvast og ikki er ein lygisøga við eittans endamáli - at royna at flyta stemmur frá Sambandsflokkinum til Javnaðarflokkin.

Sambandsflokkurin var EINASTI flokkur sum ikki vildi skerja blokkin, tí vit mettu tað verða óforsvarligt, tí nógv er á láni at gera aftan á kreppuárini, sum krevur stórar íløgur - t. d. innan eldrarøkt, heilsuverk, vegakervi osfr.

Eg og mong við mær kenna ein annan flokk, sum mælti til at skerja blokkin við 107 mio krónum, sum svaraði til teirri upphædd, sum blokkurin var prístalsviðgjørdur - nevniliga TÌN flokkur.

Tað skilagóða í hesum uppskoti vil eg lata onnur døma um.

Halt teg til veruleikan - tað man verða frægast í longdini.

Blíðar heilsur.

# Øðrvísi barna- og ungdómspolitikkur

**Bill Justinussen**
*Valevni Miðfloksins í Eysturoy*



**Tíðarrákið**

Føroyska samfelagið verður í dag stýrt av mammon. Tíðarrákið er, at øll skulu arbeiða, tí arbeiðs-marknaðurin krevur tað. Soleiðis er tørvurin á ansingarplássum til børn, gomul og óhjálpin íkomin. Hesin tørvurin hevur lyft skattatrýstið almikið, tí ansingarstovnar, røktarheim v.m. kosta samfelagnum nógvan pening. Hetta hevur aftur við sær, at ógjørligt er hjá eini vanligari familju at liva av einari inntøku. Fyri okkum mongu, sum ikki ynskja hetta slag av samfelagi, økist mistrivnaðurin bæði hjá okkum foreldrum og serliga hjá børnum okkara.

**Slept endanum**

Meðan politiska øsingin og villeiðingin um samband og loysing hevur upptikið 99% av øllum politiskum kjaki seinastu nógvu árini, hevur politiski myndugleikin als ikki stýrt eftir nakrari miðvísari ætlan á trivnaðarøkinum. Endin er sleptur og

- skattatrýst
- arbeiðsmarknaðarpolitikkur
- familjupolitikkur
- eldrapolitikkur

reka fyri vág og vind. Og nú hómast toppurin av ísfjallinum. Børn og ung mistrívast;

- harðskapur
- rúsevnamisnýtsla
- vansorgan o.a.

gera um seg meiri enn nakrantíð, tí familjan sum hornasteinur samfelagsins hevur mist sína uppruna-ligu merking.

**Familjan og trivnaðurin**

Tí vil Miðflokkurin stovna eitt FAMILJU- OG TRIVNAÐARMÁLASTÝRI, sum m.a. gjøgnum skúlaskipan okkara fær uppgávuna at seta familjuna og trivnaðin á dagsskránna. Samfelagið má taka við, har familjan ikki orkar meira.

**Broyttur lívsstílur**

Broyttur lívsstílur eigur at gerast eitt lyklaorð. Ansingarstovnar, skúlarnir, almennu loftmiðlarnir, politikkarar og almennir stovnar v.m. eiga at ganga á odda og geva børnum okkara grundleggjandi og holla undirvísing um vandarnar við rúsevnum, royking, skeivum matvanum, ov lítlum svøvni, ov nógvari passivari tilveru, ov lítlari likamsvenjing, skeivari persónligari røkt og eigur at læra munandi meira um sosialisering, umsorgan fyri næstanum, moral, etik o.s.fr. Alt hetta vil minka um talið á teimum, sum enda sum almannaklientar og sjúklingar. Í staðin fyri at gerast byrður fyri samfelagið gerast fleiri til gagn, og samanlagt vilja almennu útreiðslurnar minka og inntøkur landshúsarhaldsins økjast.

# Loysing ella samband

**Otto West**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*

Ætla vit framvegis at vera í ríkisfelagsskapi við danir, ella skulu vit verða loyst frá honum, hetta mugu føroyingar gera sær greitt til hetta valið, tí koma loysingarflokkarnir á ting við meiriluta, verður loyst, tað hava teir greitt meldað út við, og tá vendist ikki aftur. Vit hava sæð hvussu Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt tað í honum listir, hinir hava bert fylgt honum, løgmaður hevur ferð eftir ferð havt trupuleikar við Tjóveldisflokkinum, men hevur latið alt um seg ganga.

At núverðandi landstyri reypar sær av góðari fíggjarstýring, og at landskassin eigur væl av peningi, tað meini eg ikki, at teir kunnu taka sær alla æruna av, tí ongantíð hava verið so høgir fiskaprísir, og samstundis góður fiskiskapur, sum í farna valskeiði, og tá so vil til, er lætt at hava ein góðan búðskap, uttan at hava æruna av honum, tað er frá skaparans hond.

Men rætt skal vera rætt, landskassin eigur væl av peningi, hesin peningur kundi eins væl verið farin í umfar í samfelagnum, sum nakað av honum burdið verði farin, heldur enn at enda í landskassanum, men hvat skal hesin peningur nýtast til?

Hví hava samgonguflokkarnir verið so grammir at spara saman? Tað plagdi nú ikki at vera Tjóðveldisflokkinum fyri. Jú fyrst, fyri at vísa á, at vit hava pening til avlops, og tí nýtist okkum ikki at verða í ríkisfelagsskapi við danir, vit klára okkum jú sjálvi. Næsta er, at koma teir til at loysa, verður brúk fyri peningi landskassans og meiri afturat. Men at samfelagið ikki verður røkt; verkfall hvørjaferð lønarsamráðingar eru o.a. hetta eru bert teir fyrstu verkirnir av loysingini, men tað sær ikki út til at nerva teir, teir vilja ofra alt fyri loysingina. Góðu føroyingar, latið ikki hugmógina og errinskapin, íð loysingarflokkarnir trútta niður í tykkum, verða føroyingum at bana, hugsið tykkum sera væl um, eisini tit ungu, hvat íð er føroyingum til besta.'Tað er bert Sambandaflokkurin, íð veruliga vil verða í ríkisfelagsskapi við danir. At aðrir flokkar siga seg vera eins góðir sambandsflokkar, sum sambandsflokkurin man ikki vera. Javnarflokkurin var, sum vit minnast, næstan ein loysingarflokkur eftir síðsta væl, men sær nú ein vinning í stemmun, við at verða sambandsflokkur.

Nei, tað er bert ein støðufastur flokkur, íð vil verða innan fyri ríkisfelagsskapin og tað er Sambandsflokkurin, hann vil øllum føroyingum tað besta.

Góðu føroyingar farið tí á val og veljið ein sterkan sambandsflokk á ting.

Gott val.